# Nú skulu vegirnir í Hovi hava navn



*Nú skal navn setast á allar vegir í Hovi*

**Hovbingar fáa nú høvi at koma við uppskotum um, hvussu vegir og gøtur í bygdini skulu nevnast**

GØTUNØVN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu eisini vegir og gøtur í Hovi hava nøvn.

Tað er lóg, at allir vegir í bygdum og býum skulu hava nøvn og nú ætla eisini hovbingar at taka stig til at hendan løgtingslóg kann haldast.

Tað er sera óheppið, at so fáar bygdir og býir hava gøtunøvn, serliga tá ið talan er um neyðsendarørindi, har lækni, sjúkrabilur ella brandbilur, sum ikki altíð eru staðkend, skulu finna eini hús í eini knappari vending.

Á bygdaráðsfundi hevur bygdaráðið í Hovi samtykt senda skriv í øll hús í Hovi, har borgararnir fáa høvi til at koma við uppskotum um, hvussu vegir og gøtur skulu kallast.

Tá ið nøvn skulu setast á vegir og gøtunøvn, hevur bygdaráðið fingið nakrar leiðbeiningar frá Matrikkulstovuni um, hvussu tað eigur at verða gjørt.

Eitt nú verður mett, at tað er óheppið, at sama vegastrekkið hevur fleiri nøvn.

Sum dømi um áhepnað navnagerð, nevnir Matrikkulstovan strekkið frá Vesturkirkjuni í Havn, yvir í Bøkjarabrekku.Her er talan um sama vegastrekki, men tað hevur ikki færri enn seks nøvn: Framvið kirkjuni eitur tað Á frælsinum, sjálvt svingið eitur Mattalág, so kemur J. Paturssonargøta, Niels Winthersgøta, Steinatún og at enda kemur sjálv Bøkjarabrekka.

# FM í handilsframsýningum

**Góðgætisposarnar hava teir fingið frá Kjølbro Heilsølu í Klaksvík, so nú er bara um at fáa ferð á hugflogið. Næstu tríggjar vikurnar fara handlar kring alt landið at dystast um at skapa Føroya mest kreativu handilsframsýning**

FM-HEITI

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Mánadagin fór ein kapping um eitt heldur øðrvísi FM heitið av bakkastokki. Við størri og minni bunkum av Mars, Twix, Snickers og Bounty posum, eru handlar kring alt landið farnir at kappast um, hvør megnar at gera Føroya vakrastu og mest nýskapandi handilsframsýning. Tað er Kjølbro Heilsøla í Klaksvík, sum hevur tikið stig til kappingina og hevur latið handlunum søta tilfarið at arbeiða við.

## Góðgæti og hugflog

- Handlarnir hava fingið so nógvar góðgætisposar, sum teir hava mett seg at hava brúk fyri til júst teirra hugskot. Hetta snýr seg nevniliga ikki um, hvør kann gera tað størstu, men heldur tað vakrastu og mest nýskapandi framsýningina. Tankin er, at hetta skal vera eitt árligt tiltak, har tað fyrst av øllum ræður um at brúka hugflogið, sigur Petur Jacob Langgaard, søluleiðari á Kjølbro Heilsølu og leggur afturat, at handlarnir hava tikið serstakliga væl ímóti hugskotinum, so hetta sær út til at blíva eitt sera hugaligt samstarv.

At framsýningin eisini hevur eitt listarligt flog yvir sær, ger tað ikki verri. Til at meta um endaliga úrslitið hevur Heilsølan tískil fingið roynda listamannin Edvard Fuglø, sum saman við landsliðleikarnum Jákupi Mikkelsen og Atla Danielsen mannar dómsnevndina.

Runt um í handlunum eru fyrstu framsýningarnar longu við at taka skap, og næstu dagarnar fara umboð frá Kjølbro Heilsølu út at forvitnast eftir, hvussu leikur fer. Við sær hava tey myndatól, so at dómsnevndin út frá myndunum kann samanbera tær ymsu framsýningarnar. Vinnarin verður funnin um miðjan mars mánað, og fær hann ferðasteyp umframt eitt steyp til ognar. Nummar 2 og 3 fáa eisini steyp. Allir vinnarnir fáa harafturat eitt gávukort til eina starvsfólkaveitslu. Myndir av vinnandi framsýningunum verða at síggja í bløðunum, tá kappingin er av.




*Ein rúgva av Mars, Twix, Snicker og Bounty posum og ríkiligt av hugflogi. Mánadagin byrjaðu handlar kring alt landið at dystast um FM heitið í handilsframsýningum*



## ÁRSAÐALFUNDUR

Boðað verður við hesum til ársaðalfundar
í Føroya Sparikassa P/F

**fríggjadagin 4. mars 2005, kl. 17:00**
**á Hotel Føroyum, Tórshavn.**

**Dagsskrá**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki Sparikassans í farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti sambært góðkenda roknskapinum
4. Heimila nevnd at lata Sparikassanum ognast egin partabrøv í tíðini fram til næsta ársaðalfund
5. Val av nevndarlimi
6. Val av grannskoðara
7. Uppskot til viðtøkubroytingar
8. Ymiskt

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á stjórnarskrivstovuni, Yviri við Strond 2 frá 24. februar 2005.

Partaeigarar hava við at vísa atgongdarkort atgongd til aðalfundin, har teir hava talurætt, men ikki atkvøðurætt.

Atgongdarkort verða útflýggjað teimum partaeigarum, sum í seinasta lagi mánadagin 28. februar 2005 hava biðið stjórnarskrivstovuna um hetta umvegis teldupost til:
stjornarskrivstovan@sparikassin.fo
ella á telefon 348 571 og 348 576.

Nevndin

FØROYA SPARIKASSI

REPROZ